Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA - UEFA - ÍSF

P.O. Box 3028
Gundadalur
FO-110 Tórshavn
FØROYAR (FAROE ISLANDS)

Telefon +298 35 19 79
Telefax +298 31 90 79
e-mail: fsf@football.fo
website: www.football.fo

Peningasambond:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi | 9181 - 263.457.2 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 - 100.699.6 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 - 100.251.2 |
| Pf. Føroya Banki | 6460 - 100.390.0 |
| Postgiro | 9909 - 006.858.6 |


**Til:**

**Feløgini v. m.**

Dagf.: **13.01.2010**

Ref.: **ÍM/vh**

# Mál: INNBJÓÐING TIL B2 SKEIÐ

Í februar og mars mánaði skipar Fótbóltsambandið fyri einum B2-venjaraskeiði, (hetta er tað, sum fram til 2007 varð kallað B1). Skeiðið verður í Tórshavn í døgunum 12.-14. februar og 20.-21.februar 2010.

**Endamál/innihald:** B2-útbúgvingin er 40 tímar og gevur rætt til at fara undir B3-útbúgvingina. B2-útbúgvingini fevnir eitt nú um:

- at leggja til rættis venjingar
- at geva kunnleika um menningina hjá børnum og ungum
- við praktiskum royndum at menna førleikan at leiða og standa fyri venjing (instruera)
- fysisku krøvini í fótbólti
- venjarastarvið og egnan venjaraførleika
- dystin og dystarleiðslu
- virðisgrundarlag - Fair Play

Ongin próvtøka er, men kravt verður, at uppmøtingin er 100%. Eftir lokna útbúgving fært tú FSF B2 luttøkubræv.

**Upptøkutreytir:** Luttakari skal vera 18 ella eldri. Luttakari skal hava tikið B1 ella fleiri av grundskeiðini í gomlu útbúgvingini. Útbúgvingarnevndin hjá FSF kann tó gera frávik frá regluni um upptøku um serstøk viðurskifti tala fyri hesum.

**Luttøkugjald:** Kostnaðurin fyri skeiðið er kr. 1.500. Íroknað kostnaðin er frálærutilfar, kostarhald og evt gisting í FSF húsinum.

**Tilmelding:** Áhugaði eiga at venda sær til egið felag, sum avgreiðir tilmeldingina víðari. Tó ber eisini til at útfylla tilmeldingarlepan niðanfyri og senda hann beinleiðis til FSF. Kvittan fyri goldið luttøkugjald eigur at fylgja við. **Tilmeldingarfreistin er úti fríggjadagin 5. februar 2010**.

Meiri fæst at vita frá FSF-skrivstovuni, tlf 351979. Virgar teldupostur: virgar@football.fo, tlf. 220535

**Við ítróttarkvøðu**
**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**

**Virgar Hvidbro, 220535**
**virgar@football.fo**

ATLANTIC AIRWAYS
formula.fo

**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA, ÚTBÚGVINGARNEVNDIN**
**POSTRÚM 3028, 110 TÓRSHAVN - TELEFAX 319079**

# TILMELDINGARBLAÐ

## B2 VENJARASKEIÐ 12.-14.FEBRUAR og 20.-21.FEBRUAR 2010

| Navn | Bústaður | Føðingardagur | Tlf. | Ynskist gisting í FSF húsinum |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

**Omanfyri nevndi/u verða hervið bindandi tilmeldaður/i luttøku á omanfyri nevndu B1 skeið. Tilmeldingin skal verða FSF í hendi í seinasta lagi <u>fríggjadagin 05.02.2010</u>.**

**Luttøkugjaldið, <u>kr. 1.500,00</u> fyri hvønn, verður samstundis inngoldið Fótbóltssambandinum (avrit av kvittan viðløgd).**

______________________________ ______________________________

**(Staður/dagur)** **(Undirskrift)**